

*Allur arkitekturur á universitetinum kann tó ikki vera líka hugtakandi*

til íbúðina. Sum oftast er tað gentan, sum togar dreingin aftan á sær og velur og peikar. Hetta slag av pørum fer gjølla gjøgnum hvørja deild í IKEA. Drongurin gongur nøkur fet aftan fyri gentuna og sær oftast ikki sørt misnøgdur ella mótfallin út. Hann hevði kanska heldur vilja bíðað við at flutt saman, og kanska eisini ikki keypt so nógv í senn, pengarnir eru ikki har. Harafturat skal gentan avgera alt. Hetta fellur sjálvandi ikki altíð í góða jørð. Drongurin vil óivað bert finna sær eina góða song og eitt stórt sjónvarp. Gentan hjá honum skal sjálvandi eisini hava smá ljós, blondir á dúkin, eina fitta borðlampu, pútur til sofuna og forrestin, so skal sofan vera beiga og passa saman við gardinunum, sum eisini eru beigalittar og teimum beigalittu ljósunum í vindeygakarminum.

## Tey etableraðu

Í barnadeildini síggi eg barnakonur við maka, sum sera ágrýtin leita sær eftir møblum og øðrum lutum til ófødda barnið. Her er maðurin ein størri partur av innkeypinum og er sera eldhugaður. Bæði tykjast at hava eitt felags projekt. Kanska er tað tí, at maðurin følir, at nú fyrireikar hann seg til eina framtíð, hann sjálvur hevur verið við til at gjørt og havt ávirkan á. Tá er alt meira spennandi.

Í stovudeildini síggi eg upp aftur eldri og etablerað pør, sum eru komin at keypa okkurt einstakt innbúgv. Mátibandið er tikið við, tey hava eitt ungt starvsfólk at hjálpa sær, og diskutera umaftur og upp í saman vinklar, longd, breidd og hædd. Konan stendur og peikar, meðan maðurin mátar og skrivar niður. Starvsfólkið hinvegin stendur tolið, smílist og bíðar. Tó, aftanfyri hendan blíðsníðaða gekkaskortin hómi eg ein farra af ungdómsins ótolni yvir hesi gomlu, sum altíð taka so langa tíð.

## Einstaklingurin

Fyri einstaklingar sum meg, ið koma í IKEA, er tað mest tann niðasta hæddin, beint áðrenn útgongdina, sum er áhugaverd. Hetta er smálutadeildin. Her koma fólk, ið bert skulu hava eina skál, eina lampu, ella sum eg, einar gardinur. Úrvalið av gardinum er ikki ovurhondsstórt. Til alla lukku fyri meg. Eg hyggi eina løtu og taki so einar, ja, tað má eg viðganga: beigalittar! men við nógvum smáðum reyðum romantiskum blómum.

Við útgongdina virkar tað, sum at alt fólkið nú er léttað og róligt. Nú er stríðið av millum pørini - mann og konu - hesu ferð. Tey flestu, sum eru vorðin svong av øllum "keyparíðnum", brúka teir seinastu pengarnar upp á ein hotdog. Eg fari har, sum bussurin steðgar. Har stendur eisini ein annar drongur. Hann hevur keypt sær onkra skál síggi eg. Vit nikka bæði skiljandi til hvønn annan, glað um at hetta er yvirstaðið. Í bussinum taki eg mina ´Tysk Grammatik` fram, meðan drongurin lesur ´Harry Potter`. Til næstu ferð hugsi eg við mær sjálvum og vinki farvæl til IKEA á hesum sinni. At næstu ferð longu vísir seg at verða dagin eftir, veit eg tíðbetur ikki. Tí gardinurnar vísa seg at vera heilar tveir metrar ov langar.

## "Og hvat heldur tú so um Týskland?"

Stuttligt er, hvussu eitt fólk altíð vil hava at vita, hvussu tey eru. Føroysku fjølmiðlarnir duga sera væl at spyrja standardspurningin: "Og hvussu dámar tær so Føroyar og føroyingar, og hví valdi tú Føroyar" Eg haldi, at hesin spurningur varð givin hvørjum einasta útlendskum tónleikabólki og orkestri, sum hevur spælt á teimum nú mongu festivalum og tónleikatiltøkum, sum hava stungið seg upp á klettunum. Einki galið er tó í hesum, tí eg vildið mett, at soleiðis eru allar tjóðir í størri ella minni mun eisini Týskland.

Til mína fyrstu veitslu í Bremen, spyrja næstan øll, sum eg tosi við, hví eg havi valt Bremen, hvussu mær dámar týskarar, og hvat eg haldi vera øðrvísi í Týsklandi samanborðið við Føroyar og Danmark. Sannleikin er, at týskarar ikki eru so nógv ørðvísi enn føroyingar ella danir. Smámunir koma altíð at verða, men at finna hesar krevur, at ein hevur verið eitt longri tíðarskeið í einum samfelag. Teir stóru munirnar finnir ein serliga, tá ein ferðast í ørðum heimspørtum sum t.d Kina, hetta risastóra land líkist so avgjørt ikki Europa. Í veitsluni royni eg sum frægast at siga týskarunum, hvat teir vilja hoyra. Eg greiði frá, at teir eru sera fyrikomandi, sjálvt um tað er mær fortalt, at Bremar eru svinnir. Hetta segði ein týskari mær, sum kom úr München. Tað er sera áhugavert, at kemur ein úr sama landi, tá er tað í lagið at samanbera sín heimstað við ein annan í hesum sama landi og siga, at sín er tann betri.

## Hin fremmandi og nýggja samfelagið

Er ein hinvegin fremmandur í landinum, verður væntað, at samanberingin ella lýsingin av samfelagnum komið er til, altíð er góð. Meg lysti at vita reaktiónina hjá føroyingum, um Simon Kvamm úr danska tónleikabólkinum Nephew hevði sagt í øllum fjølmiðlum og á pallinum á G í summar, at tær føroysku genturnar eru ljótar, og at G festivalurin stinkar.

Eg haldi áfram at lýsa týskarar við nøkrum sera positivum og almennum lýsingarorðum, men skjótt er uppi. Týskararnir eru tá fúsir at hjálpa mær at greiða teimum frá, hvussu teir eru ørðvísi. Hvussu júst ein veitsla hjá teimum gongur fyri seg. At teir eru buldrutir og drekka nógv. Hetta hevur vist hvør ein føroyingur búsitandi í Danmark eisini fingið at vita. Eg smílist og eri samd við týskarunum, at soleiðis eru teir av sonnum. Tað góða er, at nú havi eg fingið nøkur lyklaorð frá týskarum, sum eg kann nýta til at lýsa teir næstu ferð, eg møti einum týskara, sum vil hava at vita, hvussu hann er ørðvísi, við hansara egnum orðum sjálvandi. Endamálið við øllum hesum er at fáa staðfest og sett orð á sín egna nationalitet.

## Tjóðskaparligur samleiki

Mentanin hjá einari tjóð er eitthvørt inngrógvið, men av sonnum eisini nakað uppfunnið og nakað, sum broytist og verður skapað av nýggjum. Føroyingar vilja eisini staðfesta sín egna tjóðskaparliga samleika so nógv, at tað oftani verður til eina sjálvútinnandi profeti. Í Danmark kunnu føroyingar t.d finna uppá at larma ekstra nógv til eina veitslu og syngja uppaftur meira, enn teir eru vanir. Hetta fyri ikki at missa okkara tjóðskaparliga samleika í einum øðrum landi og fyri at vísa dønum, at vit eru føroyingar og avgjørt ikki danir. Frændir og Kári P., hugsi eg, eru oftani meira spældir í Danmark enn í Føroyum.

Í Bremen detti eg eisini beinanvegin sjálv í hesa veit. Eg havi lovað at luttaka í einari ølstafett í desember. Tá eg eri føroyingur og norðbúgvi, meta týskarar meg eisini hava víkingarøtur, og at eg tí kann drekka nógv. Eg noyðist sjálvandi at geva teimum rætt, tí ein føroyingur eri eg av sonnum, serliga í Bremen, har eg gangi einsamøll við mínum føroyska samleika. Tað eru góðar 6 vikur til desember. Eg havi góða tíð at venja, og ølið er bíligt, tíbetur. Kortini vænti eg ikki, at hvørki føroyingar ella týskarar halda meg svíkja land mítt, um eg ikki vinni eina ølstafett ella yvirhøvður luttaki í hesum.



*Deiligt er at fáa sær ein kaffimunn á universitetinum eftir ein langan dag. Á myndini eru 5 tjóðir umboðaðar. Uttast frá vinstru: Danmark, Svøríki, Danmark, Rumenia, Italia og Føroyar*



*Tá lesturin hevur verið strævin er gott at kunna ganga sær ein túr og njóta áirnar, sum prýða universitetsumhvørvið.*